# Fíggjarmálaráðið

**Fylgiskjal 1**

Dagfesting: 2. nov. 2018

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 69 frá 30. apríl 2018 um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin), verða gjørdar hesar broytingar: |
| **4.** § 3 verður orðað soleiðis:<br>“**§ 3.** Tað í § 2, stk. 1 ásetta prosentgjaldið verður ikki rindað av niðanfyri nevndu peningaupphæddum:<br>1) Vinningi av eydnuspæli, legati, sømdargávu og líknandi.<br>2) Útgjaldi sambært løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.<br>3) Uppihaldspeningi sambært hjúnabandslóggávuni.<br>4) Útgjaldi sambært løgtingslóg um ættleiðingarstuðul.<br>5) Útgjaldi sambært løgtingslóg um lestrarstuðul.<br>6) Útgjaldi av tryggingarupphædd og líknandi.<br>7) Útgjaldi sambært løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir.<br>8) Útgjaldi av lutaeftirløn.<br>9) Útgjaldi av lívrentu og líknandi.<br>10) Útgjaldi sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, tó | **1.** Í §1, nr. 4 verður sum nr. 17 sett:<br>“17) Inntøka forvunnin í Grønlandi, sum tvungin eftirløn skal rindast av sbrt. Inatsisartutlov nr. 21 af 28. november 2016 om obligatorisk pensionsordning.” |

| | |
|---|---|
| undantikið útgjaldi sambært §§ 12, 14, 22 og 25.<br>11) Útgjaldi sambært løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.<br>12) Útgjaldi sambært løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl.<br>13) Útgjaldi sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a.<br>14) Útgjaldi sambært forsorgarlógini, tó undantikið útgjald sambært § 9, stk. 2, § 13 og § 17, stk. 3.<br>15) Útgjaldi sambært løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening.<br>16) Útgjaldi sambært kunngerð um samsýning til fosturforeldur, tó undantikið útgjald sambært § 1, stk. 1."<br><br>**6.** Í § 12, stk. 2 verður 1. pkt. orðað soleiðis:<br>"Inngjøld til eftirlønarsamansparing og persónstryggingar rinda eftirlønarskatt, sum ásett í skjali 1 til hesa løgtingslóg." | **2.** Í §1, nr. 6 verður aftan á "løgtingslóg" sett: ", tó verða av øllum inngjøldum fyribils afturhildin 40% í eftirlønarskatti, og tá skattauppgerðin er endalig, og endaliga skattskylduga ársinntøkan er staðfest, verður avlopsskattur teirra, sum sambært skjali 1 skulu rinda minni enn 40% í eftirlønarskatti, endurrindaður á eftirlønarkontu uttan rentutilskriving"<br><br>**3.** Í §1 verður sum nr. 7 sett:<br>"**7.** Skjal 1 verður sett sum skjal 1 til løgtingslóg nr. 49 frá 14. mai 2013 um eftirløn (Eftirlønarlógin)." |
| | **§ 2**<br><br>*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2019.<br>*Stk. 2.* § 3, nr.17, sum ásett í § 1, nr. 1 í hesi løgtingslóg, hevur virknað frá 1. januar 2018. |